

*Ladyfire struku avstað við fyrsta plássi, og tað var lítil ivi um, at avgerðin hjá dómarunum var tann rætta. Teir fýra ungu menninir í Ladyfire, sum skulu umboða Føroyar í Heimsfinaluni í London í desember, eru GBOB 2007 vinnarin og gittarleikarin Heini Martin Niclasen, Filip Mortensen (The Ghost og The Story Ends), og Andreas Dalsgaard og Hanus Andreasen (The Story Ends og Petur Háberg). Umframt at sleppa til London, hava Ladyfire eisini vunnið sær tríggjar dagar í studio við tøkningi frá Kringvarpinum, professionella myndatøku frá MOMO og eitt gávukort á 10.000kr til útgerð frá Simma. Hesir eykavinningarnir fara ivaleyst at koma væl við, nú teir skulu til London at taka seg fram*



*Hamferð vístu eina myrka, tunga metal-síðu, ið vit ikki hava sæð nógv til í Føroyum áður, men sum varð væl móttikin inni í Mentanarhúsinum.*





*Boys in a Band, vinnari av altjóða GBOB Challenge 2007, framførdu, meðan dómararnir avgjørdu, hvørjir teir tríggir fremstu bólkarnir vóru.*



*Frá høgru: Frásøgumaðurin Ásbjørn Bertholdsen saman við teimum fimm dómarunum: føroysku Eyðfinn Jensen, Jens L. Thomsen og Boga á Lakjuni, enska journalistinum, produsaranum og DJinum Jake McGowan og íslendska Iceland Airwaves fyriskiparanum Egill Tómasson.*

RUKO LÁSATÆNASTA
Ruko
• Umleggja alt til sama lykil
• Vit kopiera lyklar
• Útvega allar lásakassar
• Útvega lásasystem
Vit eru serkønir á økinum
VALDEMAR LÜTZEN BYGGIBÚÐ • TÍN BYGGIBÚÐ OG LÁSATÆNASTA
SKÁLATRØÐ 14 • TÓRSHAVN • TEL 30 10 20